

*Páll Isholm gjørdist tann stóri vinnarin á valinum í Gøtu*
*Mynd: Jonhard Hammer*

# Borgarstjórin fall í Gøtu

**Tjóðveldislistin fekk toppskoraran og tvey umboð í nýggja bygdaráðið, og ung kvinna endaði ovast á Fólkaflokslistanum**

KOMMUNUVAL
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Mest óvæntaða hendingin á kommunuvalinum í Gøtu var, at borgarstjórin seinastu fýra árini, Halltóra Ranghamar, fall á valinum.

Sambandslistin misti annan av sínum monnum, og tað gjørdist borgarstjórin, sum reyk úr bygdaráðnum. Tað var bara ein atkvøða millum hana og nýggjan mannin í bygdaráðnum, Svenn Olsen.

Tjóðveldisflokkurin hevur havt trupult við at vinna sær umboðan í bygdaráðnum í Gøtu, men hesaferð bar til.

Handilsskúlastjórin Páll Isholm dróg lessið, og listin fekk tvey umboð. Páll gjørdist toppskorari, og Maud Poulsen, sum fólk Undir Gøtueiði høvdu tikið seg saman um at velja, var hitt umboðið.

## Roynd politisk familja

Á fólkaflokslistanum gjørdist tað ein ung kvinna, sum var toppskorari. Men hóast Poula Gregersen er nýggj í politikki, so er hon av royndari politiskari familju.

Langabbin Jóan Pauli, abbin Oddfríður og pápin Páll – allir við eftirnavninum Gregersen – hava verið borgarstjórar í Gøtu, og nú sleppur Poula at royna seg í bygdaráðnum.

Á Javnaðarlistanum høvdu bæði Andrias Petersen og Pauli Jarnskor valt ikki at stilla uppaftur, og tí skuldu onnur fólk veljast. Tað gjørdust Oluffa Joensen, sum var á uttanflokkalistanum seinast, og Hans Mourits Foldbo.

Av teimum, sum vóru vald hesaferð, er tað bara Hans Mourits, sum býr í Norðragøtu. Hini búgva í Syðrugøtu og Undir Gøtueiðið. Tað er óvanligt, at býtið er soleiðs í bygdaráðnum.

## Tilflytari favorittur

Nú fer telvingin um borgarstjórasessin í gongd, og eitt av greiðu boðunum til hendan sessin er fyrst valdi limurin, Páll Isholm.

Hann hevur ættarbond í Gøtu, men er tilflytari til bygdina. Hann er stjóri á Handilsskúlanum á Kambsdali og hevur búð í Gøtu í nøkur ár.

– Eg skal ikki útiloka, at eg havi hug at gerast borgarstjóri, men eg havi eisini eitt annað starv at hugsa um, og eg má fyrst fáa greiði á, um tað letur seg gera at samantvinna størvini, sigur Páll Isholm.

– Tað er ein spennandi tíð fyri framman, og tí kundi verið áhugavert at verði borgarstjóri. Fasta sambandið til Norðoyggjar fer at skapa nógvan trafikk her, og tað er eisini neyðugt at betra um karmarnar hjá bæði vinnulívi og felagslívi í Gøtu, sigur Páll Isholm.

Næstu dagarnir fara at vísa, um tað verður toppskorarin á valinum, sum verður borgarstjóri, ella um politiska telvingin fer at hava okkurt annað við sær.



*Nakrir av bygdaráðslimunum avmyndaðir í Gøtu skúla beint eftir at valúrslitið var kunngjørt. Frá vinstru: Hans Mourits Foldbo, Maud Poulsen, Oluffa Joensen, Svenn Olsen og Steintór Jacobsen*

*Mynd: Jonhard Hammer*



*Poula Gregersen er fjórða ættarlið í Gregersen familjuni, sum er umboð í Gøtu kommunu. Frá vinstru: Páll Gregersen, Poula, Gregersen og Oddfríður Gregersen*

*Mynd: Jonhard Hammer*









*Nú stendur á gomlum nøglum. Spenningur var stórur á loftinum í húsunum, sum er keypt til kommunhús hjá nýggju Sundakommunu, á Oyrarbakka*

# Heðin Zachariasen toppskorari

**Heðin Zachariasen í Streymnesi gjørdist toppskorari til valið í nýggju Sunda Kommunu við 120 atkvøðum og fekk eina greiða álitisváttan frá veljarunum**

KOMMUNVAL
*Orð og myndir*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Heðin Zachariasen, borgarstjóri í Hvalvíkar kommunu, varð fyrst valdur á valinum til nýggju Sunda Kommunu.

Heðin sigur við Sosialin, at tað fyrsta, hann fer at gera, er sjálvsagt at kalla tey, sum eru vald, saman.

- Tað er av stórum týdningi at skipa kommuna við formanni og nevndum, soleiðis at umsitingin kann verða klár, tá kommunurnar verða lagdar saman 1. januar 2005.

Sum nakað nýtt hjá teimum, sum hava sitið í teimum ymisku kommunustýrunum, ið nú fara í søguna, er nevndararbeiði, og tað fer at gera bygdaráðsarbeiðið meira spennandi enn áður.



*- Tað er av stórum týdningi at skipa kommuna við formanni og nevndum, soleiðis at umsitingin kann verða klár, tá kommunurnar verða lagdar saman 1. januar 2005, sigur Heðin Zachariasen, sum ætlar sær at leggja upp til eitt breitt samstarv*

Heðin bjóðar seg fram til borgarstjórastarvið, og ætlar sær at leggja upp til eitt breitt samstarv.

Næstvaldur er Árni Dam við 93 atkvøðum, og síðani kemur Jógvan Mørkøre við 62 atkvøðum. Sofus Debes Johannesen, borgarstjóri við Gjógv fekk 40 atkvøður og fegnast um, at tað eydnaðist smáu komm-unum at fáa umboðan í samanløgdu kommuni.

Borgarstjórin í Haldarsvíkar Kommunu, Pól Grunnveit, stillaði ikki uppaftur, men tjørnuvíkingar stóðu sterkir um sín mann, og Asbjørn J. Djurhuus var valdur við 49 atkvøðum.

Av teimum trimum listunum, sum stillaðu upp, varð listin hjá Heðini, listi C, tann sterkasti við 437 atkvøðum. Næstur kemur listin hjá Árna, listi B, við 263 atkvøðum og síðani kemur listin hjá Jógvani, listi A, við 242 atkvøðum.

Tað eydnaðist ikki Lars Gunnari Dahl Olsen, borgarstjóra í Saksun, at verða afturvaldur á valinum týsdagin. Alt annað líka, kundi hann havt verið valdur við lutakasti, um saksuningar høvdu satsað upp á eitt valevni ístaðin fyri tvey.

Tað eydnaðist tveimum kvinnum at verða valdar í nýggja bygdaráðið. Tær eru, Gurið Samuelsen úr Haldarsvík og Jana Mouritsen úr Hvalvík.

Hinir valdu eru: Kjartan S. Jensen, Oyri, Kim Durhuus, Hósvík, Jónleif Samuelsen, Haldarsvík og Trúgvi K. Joensen, Hvalvík.



*Samráðingarnar eru longu byrjaðar. Jóvan Mørkøre bjóðar Gurið Samuelsen onkran góðan sess, men hon sær heldur skeptisk út. Spennandi verður at síggja, hvussu leikur fer og hvør fer at manna ymisku nenvdirnar í nýggja bygdaráðnum*



*Tað eydnaðist tveimum kvinnum at verða valdar í nýggja bygdaráðið. Tær eru, Gurið Samuelsen úr Haldarsvík og Jana Mouritsen, (til vinstru á myndini) úr Hvalvík. Jana og Gurið eru báðar 31 ára gamlar og vórðu konfirmerðar saman*



*Hóast greitt var, so hvørt valúrslitini komu frá ymisku valstøðunum, hvørji fóru at verða vald, so var spenningur stórur til formaðurin í valnevndini, Heðin Olsen, kom við samlaða atkvøðuúrslitinum*